LM-099/2023

Fylgiskjal 79

Hoyringssvar til uppskot um burðardygga ferðavinnu.

Haraldssund 23.Februar

Tað er gott, at man politiskt roynir at koma víðari við hesum langa og torskilda málið.

Eg haldi at tá man hevur valt at reka ferðavinnu í Føroyum, so er tað eyðsæð við tí fyri eyga at pengar skulu liggja eftir. Hetta er eisini ein góður møguleiki, sum tað so ofta hevur verið víst á, hjá jarðareigarum og festarum at vinna sær nøkur eyka oyru, og kanska enntá at fáa eitt fulttíðarstarv á egnum garði. Tí meti eg tað verða tíðningarmikið at eigarar og brúkarar eisini fáa ferðavinnulunnindini tryggjaði, av egnum garði.

Hetta eru broytingar sum eg mæli til:

1. Fyrst og fremst vil eg helst ikki at vit í Føroyum kalla ferðavinnuna burðardygga tá hon ikki heilt og fult kann uppfylla treytirnar fyri at verða burðardygg. Um vit vilja hava eina ferðavinnu, so er tað við peningaligum vinningi fyri eyga. Hon kundi kanska verið kalla "skynsom ferðavinna" ella okkurt annað.
2. Í §3 er ein heimild givin einum og hvørjum at ganga frítt uttangarðs. Her haldi eg at man eigur at seta seg at hugsa um hvussu nógv tað er. Sjálvur haldi eg at man eigur at gera mun á føroyingum og útlendingum.
3. Í §5. Stk. 2. og Stk. 3. er eftir míni meting nokkso mótsigandi Stk. 1. og kann lætt skiljast sum at landstýrisfólkið við einum pennastroki kann taka ferðavinnulunnindini frá eigara ella brúkara. Tí er gultfarvaða paragraffin niðanfyri mítt uppskot um hvussu §5 kann síggja út.

   § 5. Uttan mun til ásetingina í § 3 kann handilslig ferðavinna bara útinnast í samráð við eigara ella brúkara.

   Stk. 2. Ásetingin í stk. 1 gevur ikki eigara ella brúkara heimild at nokta øðrum eigara ella brúkara at ferðast ígjøgnum hagan, so hesin kann reka ferðavinnu í egnum haga. Hetta verður skipað í §6 stk. 2. pkt.1.
4. Og at enda, um ósemja valdar millum teir ymisku partarnar (eisini millum landsstýrisfólkið og annan part) í onkrum máli sum t.d. tá økir skulu stongjast ella friðast fyri ferðafólki, so burdi verið ein ella annar máti at loyst ósemjurnar uppá. Sum eitt dømi kann eg nevna at í gyrðingarlógini kunnu hegnsýnismenninir skera ígjøgnum tá trætumál taka seg upp.

Vinarliga

Kári Klettskarð í Kongsstovu

Festari og ognarmaður